LM-066/2023

Fylgiskjal 2

UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Innanhýsis
Tórshavn, tann 6. desember 2023
J.Nr.: 23/18810
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: SSJ/ABD

Hoyringarnotat um uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin), anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder (Vinnufyritøkulógin), anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde og í løgtingslóg um tryggingarvirksemi
(Innheinting og skráseting av upplýsingum um veruligar eigarar, tvingsilsavtøka o.a.)

Uttanríkis- og vinnumálaráðið sendi tann 3. oktober 2023 uppskotið til hoyringar hjá viðkomandi myndugleikum og feløgum. Hoyringarfreistin var tann 31. oktober 2023.

Hesir myndugleikar og feløg fingu uppskotið til hoyringar:
Vinnuhúsið, Felagið Føroyskir Grannskoðarar, Advokatfelagið, Felagið Peningastovnar, Trygd, Betri Trygging, Lív, Betri Pensjón, Eftirlønargrunnur Løntakaranna, Løgmálaráðið, Fíggjarmálaráðið, TAKS, Dátueftirlitið, Føroya Rættur og Føroya Landfúti.

Uppskotið hevur eisini ligið frammi til hoyringar á heimasíðu Uttanríkis- og vinnumálaráðsins.

Hesir myndugleikar og feløg hava sent inn viðmerkingar til uppskotið:

- Føroya Arbeiðsgevarafelag
- Felagið Føroyskir Grannskoðarar
- Fíggjarmálaráðið
- TAKS
- Føroya Landfúti

Fíggjarmálaráðið svaraði, at ráðið ikki hevur viðmerkingar til uppskotið.

Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum til hoyringarsvarini:

Føroya Arbeiðsgevarafelag
Felagið tekur yvirskipað undir við endamálinum við uppskotinum.

Til § 225, stk. 1 í vinnufelagalógini (§ 1, nr. 11-22 í uppskotinum)
Felagið vísir á, at ein tvingsilsavtøka av einum felagi er eitt stórt inntriv í viðurskiftini hjá felagnum. Tí tekur felagið fyri givið, at eitt felag, ið kann sendast til tvingsilsavtøku sambært § 225, stk. 1, í lógini fær eina áminning um at bøta um viðurskiftini, áðrenn avtøka verður framd. Víst verður á, at Skráseting Føroya eigur at senda áminning áðrenn, og eigur at hava eina einsrættaða mannagongd fyri, til hvønn og hvussu ein slík áminning verður givin, so tað ikki er ivamál um, hvørt áminningin er komin til móttakaran.

Viðmerkingar Uttanríkis- og vinnumálaráðsins
Uttanríkis- og vinnumálaráðið er samt við Føroya Arbeiðsgevarafelag í, at tvingsilsavtøka er eitt stórt inntriv.

Sambært § 225, stk. 2, í vinnufelagalógini kann Skráseting Føroya, áðrenn avgerð verður tikin um tvingsilsavtøku, áseta eina freist, har kapitalfelagið innan freistina kann bøta um viðurskiftini, sum hava ført til ætlaðu tvingsilsavtøkuna.

Tað stendur greitt í almennu viðmerkingunum í uppskotinum og í serligu viðmerkingunum til ásetingina í § 1, nr. 11-12, at feløg verða ikki send til tvingsilsavtøku uttan tey frammanundan hava fingið eina áminning við freist frá Skráseting Føroya. Í serligu viðmerkingunum stendur:

Tvingsilsavtøka er eitt álvarsamt stig at taka, men er tað somuleiðis seinasti útvegur at fáa viðurskifti í rættlag. Sum er verður møguleikin ikki troyttur, fyrr enn felagið hevur fingið boð við áminning um at fáa viðurskiftini í rættlag innan eina freist, sum Skráseting Føroya ásetir sambært § 225, stk. 2 í vinnufelagalógini.

Harvið verður tað mett at vera greitt, at kapitalfeløg fáa eina áminning, áðrenn avgerð verður tikin um at senda felagið til tvingsilsavtøku. Viðmerkingarnar frá Føroya Arbeiðsgevarafelag hava tí ikki ført til nakra broyting í uppskotinum, sum var úti til hoyringar.

Felagið Føroyskir Grannskoðarar
Yvirskipað tekur felagið undir við, at lóggávan verður dagførd.

Til § 58 a, stk. 4, í vinnufelagalógini (§ 1, nr. 5 í uppskotinum)
Felagið vísir á, at tað sambært ásetingini verður álagt høvuðsleiðslu felagsins í minsta lagi eina ferð um árið at kanna, um broytingar skulu gerast til veruligar eigarar í kt-skipan Skráseting Føroya og úrslitið við skjalprógvum skulu leggjast fyri ársaðalfund felagsins. Felagið spyr, um tørvur er á at leggja hetta fyri aðalfundin, tá leiðslan er vitandi um, at ongar broytingar eru? Hví ikki siga, at bert tá broytingar eru skal úrslit og skjalprógv leggjast fyri aðalfundin til góðkenningar.

Viðmerkingar Uttanríkis- og vinnumálaráðsins

Endamálið við at leggja úrslitið frá árligu kanningini, sbrt. uppskotnu § 58 a, stk. 4, 2. p kt., er at tryggja, at felagið ella løgfrøðiliga eindin, umboðað av leiðsluni, hevur hildið skyldu sína at gera árligu kanningina, sbrt. uppskotnu § 58 a, stk. 4, 1. pkt.

Besti hátturin at tryggja, at árliga kanningin verður raðfest er, at úrslitið frá kanningini verður lagt fram á aðalfundinum (ella líknandi). Í hesum sambandi er tað eisini týdningarmikið, at aðalfundurin fær kunning um, at árliga kanningin er gjørd og at úrslitið til dømis er, at ongar broytingar eru í skrásettu upplýsingunum um veruligu eigararnar.

Meðan aðalfundurin (ella líknandi) sambært galdandi lóggávu skal góðkenna ársfrásøgnina, so skal uppskotna árliga kanningarskyldan ikki skiljast soleiðis, at aðalfundurin skal góðkenna úrslitið frá kanningini. Tvørturímóti kann felagið (leiðslan) ikki bíða við at skráseta møguligar broytingar í skrásettu upplýsingunum um veruligu eigararnar, bert vísandi til, at aðalfundurin ikki hevur góðkent árligu kanningina. Slíkar broytingar skulu skrásetast skjótast til ber, sbr. eitt nú uppskotnu § 58 og § 58 a, stk. 3, í vinnufelagalógini.

Tað verður tískil mett at vera umráðandi, at leiðslan fær skyldu til at leggja úrslitið frá árligu kanningini fram á aðalfundinum (ella líknandi), uttan mun til ítøkiliga úrslitið.

Til § 58 a, stk. 9, í vinnufelagalógini (§ 1, nr. 5, í uppskotinum)
Felagið vísir á, at kunngerð, sum verður gjørd við heimild í ásetingini, eigur at verða send felagnum til hoyringar, áðrenn hon verður sett í gildi.

Viðmerkingar Uttanríkis- og vinnumálaráðsins
Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur tað sum fasta mannagongd, at uppskot til kunngerðir verða send viðkomandi pørtum til ummælis, áðrenn ein kunngerð verður sett í gildi, og tann mannagongdin verður eisini brúkt, um ein kunngerð verður gjørd við heimild í hesi ásetingini.

Til § 225, stk. 1, nr. 9, í vinnufelagalógini (§ 1, nr. 12, í uppskotinum)
Felagið heldur tað vera eitt ov víðfevnt stig at taka, at feløg, sum ikki hava goldið ársgjald upp á ávikavist 700 kr. og 1200 kr., kunnu verða send til tvingsilsavtøku. Felagið mælir til, at verandi skipan verður varðveitt, og at vanligu innheintingarreglurnar verða brúktar í slíkum førum.

Viðmerkingar Uttanríkis- og vinnumálaráðsins

Uppskotni møguleikin fyri tvingsilsavtøku skal síggjast í tí samanhangi, at ársgjaldið fer til umsiting av vinnufelagaligu reglunum, undir hesum til innsending og kunngering av ársroknskapinum, fráboðan um broyting av ársroknskaparári, grannskoðaraviðurskiftum, navni ella heimstaði[1].

Skráseting Føroya er ein fyrisitingarmyndugleiki, sum ikki hevur heimild til at sýta fyri at taka ímóti og at kunngera ársroknskapin ella aðrar broytingar, hóast felagið ikki rindar árliga gjaldið, sum fíggjar útreiðslurnar, sum standast av hesum arbeiði. Umframt at hava neiliga ávirkan á inntøkugrundarlagið hjá Skráseting Føroya, so er røkt av útistandandi skuld og at innheinta eftir teimum vanligu inniheintingarreglunum ein rímiliga umfatandi umsitingarlig uppgáva fyri stovnin.

Til tess at feløg skulu taka skyldu sína at rinda árliga gjaldið í størsta álvara, verður tað mett neyðugt at geva Skráseting Føroya heimild til at taka stig til at tvingsilsavtaka feløg, sum ikki rinda árliga gjaldið fyri umsiting av vinnufelagaligu reglunum. Áðrenn stig verður tikið at tvingsilsavtaka eitt felag, gevur stovnurin felagnum eina freist fyri at fáa viðurskiftini í rættlag, og ikki fyrr enn hendan freistin er runnin, verða meira álvarsomu stigini tikin.

TAKS

Til § 58 a, stk. 3, í vinnufelagalógini (§ 1, nr. 5, í uppskotinum)
TAKS vísir á, at har orðingin "skjótast gjørligt" verður brúkt, eigur at vera ein meira ítøkilig tíðarfreist lýst. TAKS skjýtur upp, at hetta verður gjørt í viðmerkingunum.

Viðmerkingar Uttanríkis- og vinnumálaráðsins

Viðmerkingin hjá TAKS er tikin til eftirtektar.

[1] Sbr. fylgiskal 1, pkt. 2.7, til kunngerð nr. 144 frá 23. oktober 2018 um fráboðan, skráseting og almannakunngering o.a. hjá Skráseting Føroya.

Viðmerkingin til orðingina "skjótast gjørligt" í eitt nú uppskotnu § 58 og § 58 a, stk. 3, er av misgáum sett inn undir serligu viðmerkingarnar til uppskotnu § 58 a, stk. 4. Hetta er nú fingið í rættlag.

Til § 319 í vinnufelagalógini (§ 1, nr. 31 og nr. 32, í uppskotinum)
TAKS vísir á, at uppskotið eigur at innihalda revsingar ella aðrar avleiðingar fyri brot á:
1) árligu skylduna at kanna, um broytingar skulu gerast í skrásettum upplýsingum um veruligar eigarar, og
2) skylduna eftir umbøn at veita felagi upplýsingar um ognarviðurskifti, so at tað kann eyðmerkja veruligu eigarar sínar.

TAKS metir, at revsingin fyri brot á kanningarskylduna kundi verið avtøka ella sekt. Revsingin fyri brot á upplýsingarskylduna kundi verið sekt. Harafturat vísir TAKS á, at tað møguliga eisini eigur at hava avleiðingar fyri rættin til vinningsbýti og líknandi hjá teimum, sum eftir umbøn ikki vilja upplýsa um ognarviðurskifti síni, hóast tey hava skyldu til tað.

Viðmerkingar Uttanríkis- og vinnumálaráðsins
Viðv. 1:
Uppskotið heimilar Skráseting Føroya at taka stig til at tvingsilsavtaka feløg og fyritøkur, sum ikki halda skyldur sínar viðvíkjandi upplýsingunum um veruligu eigararnar. Harumframt verða revsiásetingarnar í galdandi vinnufelagalóg, vinnufyritøkulóg, grunnalóg og tryggingarlóg førdar víðari, soleiðis at feløg og løgfrøðiligar eindir, sum ikki halda skyldur sínar viðvíkjandi upplýsingunum um veruligu eigararnar, kunnu revsast við bót.

Uppskotna árliga kanningarskyldan hevur til endamáls at tryggja, at leiðslan og aðalfundurin (ella líknandi) á hvørjum ári skal fyrihalda seg til skrásettu upplýsingarnar um veruligu eigararnar. Staðfestir leiðslan, at ongar broytingar eru í skrásettu upplýsingunum, so skal niðurstøðan ikki fráboðast til Skráseting Føroya, men skal felagið goyma skjalprógv fyri, at árliga kanningin er gjørd, sbr. uppskotnu § 225, stk. 1, nr. 5, har ásett er, at Skráseting Føroya kann taka stig til at tvingsilsavtaka feløg, ið hava goymt ófullkomið skjalprógv sambært uppskotnu § 58 a.

Er niðurstøðan hinvegin tann, at broytingar eru í skrásettu upplýsingunum um veruligu eigararnar, og verður hetta ikki skrásett skjótast gjørligt, so kann Skráseting Føroya taka stig til at tvingsilsavtaka felagið ella fyritøkuna, og/ella lata løgregluni málið, sbr. eitt nú uppskotnu ásetingarnar í § 225, stk. 1, nr. 3-5 og § 319, stk. 1 og 4, í vinnufelagalógini.

Mett verður, at uppskotnu heimildirnar eru nøktandi til tess at tryggja, at feløg og løgligar eindir fara at taka uppskotnu árligu kanningarskylduna í álvara.

Viðv. 2:
Persónar, sum ikki halda skyldur sínar viðvíkjandi upplýsingum um veruligu eigararnar, kunnu sum er revsast fyri brot á fráboðanarskylduna í § 55 í vinnufelagalógini, sbr. § 15 f í vinnufyritøkulógini og §§ 7-9 í eigarakunngerðini, sbr. § 319, stk. 1 og 4, í vinnufelagalógini, og § 22 í eigarakunngerðini.

Havast skal í huga, at markvirðini í § 55 í vinnufelagalógini eru væl lægri. Tað er sum byrjanarstøði persónar og feløg, sum hava ræði á meira enn 5% av atkvøðurættindunum hjá felagskapitalinum. Felagið skal hava eina eigarabók, og upplýsingar um løgligu eigararnar skulu fráboðast felagnum í seinasta lagi 2 vikur eftir, at eitt av mørkunum í § 55, stk. 1, í

vinnufelagalógini verður rokkið ella ikki longur er rokkið, sbrt. § 56, stk. 1, í vinnufelagalógini, sum eisini er revsiáløgd, sbr. § 319, stk. 1, í vinnufelagalógini.

Vísandi til tað, sum er nevnt omanfyri, verður tað ikki mett neyðugt at áseta neyvari reglur um revsing fyri brot á eitt nú uppskotnu § 58 a, stk. 2, sum snýr seg um veruligu eigararnar, tað er sum byrjanarstøði persónar og feløg, sum hava ræði á meira enn 25% av atkvøðurættindunum hjá felagskapitalinum.

Til § 15g, i og j, í vinnufyritøkulógini (§ 2, nr. 1-3, í uppskotinum)
TAKS heldur tað vera ein vansa, at viðkomandi ásetingar ikki fevna um øll íognarfeløg ella kommanditfeløg, og tí mælir stovnurin til, at § 2, stk. 3, í vinnufyritøkulógini verður broytt.

Viðmerkingar Uttanríkis- og vinnumálaráðsins
Viðmerkingin hjá TAKS er tikin til eftirtektar.

Skotið verður upp, at ásetingarnar um skráseting av upplýsingum um veruligu eigararnar eisini verða settar í gildi fyri íognarfeløg og kommanditfeløg, ið ikki eru skrásetingarskyldug sambært vinnufyritøkulógini. Lagt verður upp til, at broytingin verður sett í gildi seinni við kunngerð landsstýrismansins. Orsøkin til hetta er, at verandi KT-skipan Skráseting Føroya ikki rúmar skráseting av upplýsingum um hesi feløg. Ein nýggj KT-skipan er í væntu (Virkisskrá), og mett verður, at tað er hóskandi, at hendan broyting verður sett í gildi, tá ið Virkisskrá er liðugt ment og er tikin í nýtslu.

Føroya Landfúti
Føroya Politi vísir í sínum svari á, at tað í fleiri ásetingum í uppskotinum verður víst til, at ávísar upplýsingar kunnu latast til Føroya Landfúta, og at Føroya Landfúti kann geva upplýsingar víðari til aðrar myndugleikar.

Føroya Politi er av teirri fatan, at Føroya Politi ikki er rætti myndugleiki at vísa til, av tí at Føroya Politi ikki er kompetentur myndugleiki á økinum.

Viðmerkingar Uttanríkis- og vinnumálaráðsins
Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur broytt tær ásetingarnar í uppskotinum, har Føroya Politi verður nevnt. Ístaðin fyri Føroya Politi stendur nú *Hvidvaksekretariatet hjá National Enhed for Særlig Kriminalitet.* Á tann hátt verða ásetingarnar í samsvari við ásetingarnar í løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski og fígging av yvirgangi (hvítvasklógini), har tað er ásett, at tað er Hvidvasksekretariatet, sum er myndugleiki, tá talan er um fráboðanir um illgruna um hvítvask.

Eitt av endamálunum við lógaruppskotinum er at tryggja, at lóggávan, heruppií ásetingarnar um skráseting av eigaraupplýsingum, er í samsvari við 5. hvítvaskdirektivið hjá ES, og í samsvari við tilmælið frá FATF og frá Global Forum.

Hvidvasksekretariatet er FIU (Financial Intelligence Unit) í ríkinum, og ábyrgdarøkið hjá Hvidvasksekretariatet er at móttaka, greina og víðarilata fráboðanir um møguligt hvítvask av vinningi frá revsiverdum viðurskiftum ella fígging av yvirgangi. Tí er tað rætt, at tað heldur enn *Føroya Politi* skal standa *Hvidvasksekretariatet.*